ÚTSKRIVT ÚR GERÐABÓK LANDSSTÝRISINS.

Ár 1950, 21. desember kl. $16^{30}$, var fundur í landsstýrinum. Møttir vóru K. Djurhuus, løgmaður, R. Long og Th. Petersen.

Til viðgerðar:

1) Býti av umsitingarøkjunum.

Fylgjandi býti varð samtykt; ávísingarnar vísa til heimastýrislógina, lista A og B, soleiðis sum tey einkultu málsøkini har eru nevnd:

K. Djurhuus:

I. Spurningar í samband við nýskipanina, jbr. lista A, punkt 1.

II. Friðan av byggningum og náttúrufriðan, jbr. lista A, punkt 1.

III. Kommunal mál, jbr. lista A, punkt 2 og 3.

IV. Landbúnaða og fiskivinnu, undantikið Føroya Fiskasølu, navigatiónsskúla og kokkaskúla, jbr. lista A, punkt 13 og lista B punkt 4.

V. Lógreglumál, jbr. lista A, punkt 14 og 16 og lista B punkt 12.

VI. Kirkjuna, jbr. lista B punkt 1.

Henda deildin verður at nevna løgmannsdeildin umfatandi: nýskipanina, kommunur, landbúnaða og fiskivinnu, lógreglumál og kirkjuna.

R. Long:

I. Heilsumál, undantikið grannskoðan og roknskaparførslu, jbr. lista A, punkt 4.

II. Social- og arbeiðsmál, jbr. lista A, punkt 5.

III. Skúlamál, herundir navigatións- og kokkaskúla, og søvn, jbr. lista A, punkt 9 og 10.

IV. Post-, telegraf- og telefonmál og radio, undirdeildin í lista A, punkt 12, og lista B punkt 3.

Henda deildin verður kallað social- og mentunardeildin umfatandi: socialmál, heilsumál, skúlamál og telefonmál.

Th. Petersen:

I. Fíggjarmál, herundir eisini grannskoðan og roknskaparførslu hjá sjúkrahúsunum, jbr. lista A, punkt 6 og 7.

II. Samferðslumál, herundir tollferðslu, undantikið post, telegraf, telefon og radio, jbr. lista A, punkt 8 og 12 og lista B punkt 3.

III. Handil og ídnaða, herundir Føroya Fiskasølu, og ráevni í undirgrundini, jbr. lista A, punkt 15 og lista B, punkt 3 og5.

Hendan deildin verður at nevna <u>fíggjar- og handilsdeildin</u> umfatandi: fíggjarmál, samferðslumál, handil og ídnaða.

Samtykt varð at kunngera býtið.